# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*



*Fríggjadagin 23. februar letur Heri av Reyni upp eina listaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík*

## Heri av Reyni í Smiðjuni

Fríggjadagin 23. februar letur Heri av Reyni í Havn upp eina listaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík.

Heri, ið er útbúgvin maskinmeistari, hevur seinastu tjúgu árini starvast í Norðurlandahúsinum, men í frítíðini teknar og málar hann.

Heri hevur teknað og málað, síðan hann var ungur, og hann hevur nomið sær útbúgving innan hetta økið á kvøldskúla nakrar vetrar.

Myndaevni síni finnur Heri á gongutúrum í Havnini og har umvegir og á ferðum sínum kring landið. Málningar og tekningar hansara á hesi framsýning lýsa eitt nú náttúruna nærhendis Havnini, býin sjálvan, skip við bryggju og einstakar bygdarmyndir. Harafturat eru nakrar náttúrulýsingar í vatnlitum, ið sýna náttúruna í fjølbroyttum litum og lýsi.

Heri hevur áður sýnt fram á Ólavsøkuframsýningini og á Hotel Hafnia, men hetta er fyrsta framsýning hansara í Smiðjuni í Lítluvík.

Framsýningin letur upp fríggjadagin 23. februar kl. 17 og er opin til kl. 20. Leygardagin og sunnudagin er opið frá kl. 16 til kl. 20.

# Hans Pauli Sundstein 50 ár



Hósdagin 22. februar fyllir Hans Pauli Sundstein í Grindsted á Jútlandi 50 ár.

Hans Pauli er føddur 22. februar 1957 í Søborg nærindis Keypmannahavn.

Foreldrini eru Lydia og Jógvan Sundstein, sum í dag búgva í Holbæk.

Hans Pauli er elstur av trimum syskjum. Hini bæði eru Rutt og Eivind.

Rutt býr i Holbæk og Eivind býr á Frederiksberg.

Familjan búði í Danmark til á vári 1964, tá tey fluttu heim til Føroya. Hans Pauli var júst fyltur 7 ár. Stutt eftir at hann var fluttur til Føroya, gjørdist hann álvarsliga sjúkur. Hetta broytti lív hansara. Hann varð opereraður fyri heilasvull, og av skurðviðgerðini misti hann sjónina á báðum eygunum.

Tá vóru undirvísingarmøguleikarnir fyri brekað ikki so góðir í Føroyum. Hann mátti til Danmarkar á blindaskúla. Men hann ynskti at vera í Føroyum, og við góðari vælvild frá teimum á tí tá nýstovnaða skúlanum fyri deyv og talubrekað á Skansavegnum, kom hann inn á tann skúlan, har hann fekk alla sína skúlagongd.

Skúlin menti seg til Føroya Spesialskúla ella Skúlan á Trøðni, sum tók sær av fleiri handikappum. Sum tíðin gekk, var hann av og á á Blindaskúlanum á Refsnæs við Kalundborg og til tíðir á Blindainstituttinum í Keypmannahavn.

Eftir fólkaskúlatíðina fór hann í realdeildina, sum tá var í Hoydølum, har hann tók realprógv.

Tá hann var um leið 20 ára gamal, flutti hann til Danmarkar. Eitt skifti var hann á Blindainstituttinum, men fyri tað mesta búði hann í egnari íbúð.

Hann hevur havt ymisk arbeiði, sum hann maktaði við sínum breki. Rættiliga tætt samskifti hevur hann eisini havt við Dansk Blindesamfund.

Hann hevur verið aktivur á nógvum økjum, serliga í samband við undirvísing av blindum. Millum annað at brúka hvíta stavin. Størsta áhugan hevur hann annars fyri it-tøkni. Hann hevur tikið prógv sum undirvísari innan hetta øki og ferðast rættiliga nógv í samband við undirvísing av øðrum blindum í hesum týdningarmiklu hjálpitólum hjá blindum.

Eftir at hava búð nógv ár í Keypammanhavn flutti Hans Pauli fyri umleið trimum árum síðani til Grindsted í Jútlandi, har hann keypti sær eini hús. Hann trívist væl í tí jútska.

Adressan hjá Hans Pauli Sundstein er: Nørregade 35, DK 7200 Grindsted. Hann hevur eisini eina heimasíðu: www.hapasu.dk.

Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sos

# VIÐMERKINGAR

## Óheppið orðaval

RÚNA SIVERTSEN



Við mínum orðavali í viðmerkingunum í bløðunum hósdagin havi eg tíverri sært onkran. Tað er einki galið við teimum kvinnum, ið eru á listanum at velja ímillum. Tað er politiska stríðsmálið, fleiri av teimum verða heiðraðar fyri, ið eg tali at. Heiðringin hjá Kvinnu hoyrir ikki saman við arbeiðinum hjá Demokratia. Heldur ikki hevur heiðringin nakað við tað at gera, sum vit vanliga hava hátíðarhildið 8. mars fyri.

Sosialurin
www.sosialurin.fo

## Uttanduraskeinking er ein vanlukka aftrat

SVENING AV LOFTI



Ætlanin um at gera broytingar í rúsdrekkalógini, soleiðis at skonkt kann verða uttandura, er ein vanlukkulig ætlan.

Mín meting er, at hetta uppskotið er beinleiðis í stríð við galdandi rúsdrekkalóg, ið hevur til endamáls at tálma rúsdrekkanýtsluni. Hetta uppskotið fer heilt givið at økja um drykkjuskapin. Royndirnar er, at lættari tú kemur til rúsdrekka, tess meiri verður drukkið.

Endamálið broytingunum tykist mær vera eitt einasta: At hola rúsdrekkalógina út og javna vegin fyri fríari rúsdrekkasølu í Føroyum, umframt at nøkur útvald skulu hava eyka vinning av hesum skitna handli, sum gongur útyvir heilsu og lív hjá ungum og eldri landsmonnum.

Fyri mong foreldur, mammur og pápar, børn og onnur, ið kenna sviðan og ræðuleikarnar av rúsandi løgi, ið hevur herja hús og heim, er henda ætlan eitt slag í andlitið. Vit skuldu farið hinvegin og gjørt lógina strangari aftur, tí hon oyðilagt nógv nógv menniskju og heim sum er. Latið okkum bjarga tí, sum bjargast kann. Rúsdrekka hevur dripið nóg nógvar av kæru landsmonnum okkara.

Eisini er tað ein andsøgn til landsætlanina um banna royking yvirhøvur í Føroyum.

Ásannanin av at royking oyðileggur heilsuna hjá roykjarum og teimum, ið ikki roykja, men sum anda roykin inn kortini, er orsøkin til ætlanina um almenn bann av royking.

Men tað er somuleiðis staðfest at rúsdrekka oyðileggur heilsu og drepur fleiri av kæru landsmonnum okkara, og myrkaleggur lívið hjá húsfólkunum. Dag og dagliga hoyra vit um, at so og so nógvir bilførarar er tiknir fyri at koyra við kenning, at rúsdrekka var atvoldin til ferðsluvanlukkur, umframt at rúsdrekka er atvoldin til at fólk verða sligin niður á opnari gøtu, skadd og skamfýlað fyri lívið, bæði likamliga og sinnisliga.

At Sosialurin og Dimmalætting gleðast um at skoynking úti á gøtuni skal gerast veruleiki, er ógviliga harmiligt. Eingin av teim mongu foreldrum, konum og børnum í landi okkara, sum kenna – og hava kent - oyðingarsviðan av brennivínsdjevlinum, gleðast. Tey skilja einki av hesum eirindaleysa brennivínspolitikkinum, sum oyðileggur okkara ungdóm – framtíð Føroya.